From: Bára Michelsen <Bara@fmr.fo> **On Behalf Of** Fíggjarmálaráðið
Sent: mánadagur, 15. apríl 2024 13:44
To: Løgting <logting@logting.fo>; Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
Cc: Ruth Vang <Ruth@fmr.fo>; Bjarni Askham Bjarnason <bab@fmr.fo>
Subject: Viðmerking til LM-111/2023

Til fíggjarnevndina:

Fíggjarmálaráðið og Akstovan hava hugt eftir útrokningunum í lógaruppskotinum um at broyta vektgjaldið. LM -111/2023.

Greitt er, at meirinntøkurnar frá lógarbroytingini eru treytaðar av, hvør framrokning verður brúkt fyri vøkstur av elbilum næstu árini.

Í 2022 vóru 680 elbilar í landinum, í 2023 vóru 1.210 og higartil í ár er talið komið uppá 2.122.

Niðurstøða okkara er, at útrokningarnar í fylgiskjølunum til lógaruppskotið eru í lagi burtursæð frá, at framrokningin fyri sølu av nýggjum elbilum í framtíðini er ov høg (50% árligur vøkstur í talinum av elbilum er lagdur inn).

Tað er neyvan realistiskt, at tað koma fleiri enn 1.000-1.500 nýggir elbilar árliga næstu árini. Meirinntøkurnar av lógaruppskotinum kunnu metast til um 4,5 mió. kr. árliga (fyri eitt heilt ár).

Harafturat kann roknast við, at meirinntøkurnar hækka um 1,5 mió. kr. árliga.

Vinaliga / Kind regards

Bára Michelsen
Samskipari / Coordinator

Office: +298 352020
Mobile: +298 552030
bara@fmr.fo

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Fíggjarmálaráðið
Ministry of Finance
Tinganes
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Office: +298 352020
www.fmr.fo